gult cyan magenta svart



# DJ Aligator til Føroya í dag



KONSERT
*Rúnar Reistrup*

Tað hevur gingið væl at selja atgongumerkir til konsertina við DJ Aligator, tí tá talt varð upp mánadagin vóru longu seldir 600 pappírslepar av tí slagnum, sum geva atgongd til høllina á Kambsdali í annaðkvøld, tá plátuvendarakrokodillan fer á pallin.

Fyrireikararnir høvdu annars ikki væntað ta stóru søluna fyrr enn dagarnar beint frammanundan konsertini, millum annað tí at januar vanliga er ein soltin mánaður hjá bankabókum, og lønir og útbúgvingarstuðlar ikki vórðu útgoldin fyrr enn í gjár.

Harafturat hava føroyingar, sambært fyrireikarunum, tað við at keypa atgongumerkir við dyrnar, tá tað er møguligt, og tað er tað til hesa konsertina. Væl at merkja, um tær ikki verða útseldar áðrenn.

Høllin á Kambsdali tekur 1700 fólk, og fyrireikararnir hava góðar vónir um at síggja so nógvar áhoyarar í annaðkvøld, tí væl hevur verið lýst fyri tiltakinum.

Fyri at heilgardera seg ímóti møguligum seinkingum í flogferðsluni, ið altíð eru ein vandi her í landinum, kemur DJ Aligator við flogfari longu tíðiliga í dag. Við sær hevur hann seks fólk.

### Dansitónleikur

DJ Aligator, sum í veruleikanum eitur Ali Movasat, er dani, og tónleikur hansara er serliga kendur í Danmark. Men hann arbeiðir miðvíst við at sláa ígjøgnum uttan fyri heimlandið og komandi mánaðirnar hevur hann konsertir í Miðeuropa og í onkrum av hinum Norðurlondunum. Seinni í ár fer hann á konsertferð í Malaysia og Australia.

Í Føroyum hevur hann longu sligið ígjøgnum og hann man vera ein av mest spældu tónleikarunum á føroyskum dansistøðum í løtuni.

DJ Aligator spælir tað, sum á góðum føroyskum eitur dansitónleikur. Men heldur enn harmoniku og sang, brúkar hann teldu, ljómborð og elektriskar bongatrummur, og vokalljóðini liggja onkrastaðni mitt ímillum tos og sang. Afturat sær hevur hann ein percussionist og tvær sangarinnur, ið eisini eru dansarinnur.

Umframt DJ Aligator fer føroyski rokk/popp bólkurin All That Rain og DJ Martin Kjærbo at undirhalda áhoyrarunum.

Dyrnar til høllina á Kambsdali lata upp klokkan 23. Klokkan hálvgum tíggju á kvøldi fara bussar av Farstøðini inn á Kambsdal í sambandi við tiltakið. Tey, ið ætla sær at brúka hesa leiðina, skulu boða frá á Kunningarstovuni í Havn framanundan.

Atgongumerki til konsertina verða seld við dyrnar og á Statoil støðum og í 3'aranum.

# P/F Poul Hansen fer nú í oljuvinnuna



*Høgni Hansen heilsar her uppá ein umboðsmann hjá oljufyritøkuni Philips herfyri*

**"Vit trúgva upp á oljuvinnuna og tí hava stovnað felag saman við heimsins størsta matvøruveitingarfelag, Compass Group, sum skal fara undir catering, matveitingarvirksemi í eini komandi frálandavinnu, sigur Høgni Hansen, stjóri í nýstovnaða felagnum P/F Eurest Føroyar.**

OLJUVINNA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

"The Grand old Man" innan føroyska matvøruveiting, P/F Poul Hansen, sum hevur 75 ár á baki, at selja vørur til handlar og ikki minst skip, brynjar seg nú av álvara út til frálandavinnuna, sum verður stór undir Føroyum, vil undirgrundin, langt niðri undir havsins dýpi geva okkum olju í framtíðini.

Nýggja felagið fer í næstum at seta starvsfólk, sum skulu lærast upp á pallum í donskum øki, so hesi hava neyðuga førleikan, tá farið verður undir boringar í Føroyum komandi summar.

- Vit hava saman við Eurest Support Services A/S í Danmark, sum er ein partur av Compass Group, stovnað felagið P/F Eurest Føroyar og við hesum eru lunnar lagdir undir samstarv við heimsins størstu matvøruveitingarfyritøku Compass Group, sigur Høgni Hansen, stjóri í P/F Eurest Føroyar. Høgni Hansen er eisini stjóri í P/F Poul Hansen og hann umboðar triðja ættarliðið sum situr í hesum stóli.

- Myndugleikar og oljufeløg hava lagt stóran dent á, at føroysk virki og arbeiðsmegi veruliga skulu fáa møgileika at luttaka í virkseminum, sum knýtir seg at oljuleiting. Vit hava hervið tikið ímóti avbjóðingini og fara at gera okkara besta fyri at vera eitt fullgott alternativ í kappingini um cateringtænastur á føroyskum øki, sigur Høgni Hansen,

– Tað er okkara vón, at felagið kann brúka førleikan hjá stovnarunum at byggja upp føroyskan førleika og dugnaskap, so oljuvirksemi eisini innan hetta øki kann koma føroyskari arbeiðsmegi og føroyska samfelagnum til góðar, sigur Høgni Hansen.

# Skeið í kór- og orkesturleiðslu

Sum lýst aðrastðani í blaðnum í dag skipar Kórsamband Føroya fyri dirigentskeiði í sangstovu Kommunuskúlans vikuskiftið 9.-11. februar.

Skeiðið er fyrst og fremst ætlað virknum kórleiðarum; men harumframt er tað ynski kórsambandsins, at eisini onnur áhugað, helst ungfólk, skulu fáa høvi til at læra seg einfalda taktering og royna seg í tí at leiða eitt ljómlið, tað veri sær vokalt ella instrumentalt.

Innihaldið á skeiðinum verður lagað eftir, hvørjir luttakarar, ið melda seg; men í fyrsta lagi verður arbeitt við kórsatsum og kunnað um kórtilfar. Eisini er ætlanin, at tey luttakandi á hesum skeiði saman við skeiðleiðaranum skulu leggja ætlan um eina framhaldandi røð av skeiðum, sum fyri tey áhugaðu kundi endað við einum ummæli ella møguliga einari próvtøku.

Skeiðleiðari verður Mogens Dahl, sum bæði er dirigentur hjá Den Jyske Opera í Aarhus og lektari í kórleiðslu á Aalborg Universitet.

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 26. januar til hósdagin 1.februar**

# Survivor (1)




*Mánakvøldið kl. 19.00 vísir TV3 fyrstu sendingina av Survivor, sum er amerikanska útgávan av Robinson Ekspeditiónini.*

*Amerikanska kappingin líkist tí donsku nógv. Sekstan vanligir amerikanarar verða settir á eina oydna oyggj í Kinesiska havinum, har teir verða býttir uppí tveir bólkar, sum kappast sínámillum um ymsar virðislønir.*

*Tað er ikki smávegis, sum luttakararnir kunnu vinna í hesi kappingini. Virðislønin er ein heil millión dollarar til vinnaran, sum megnar at vera longst á oynni.*

# Kingo, turkarán og olja

*Árant Hansen ummælir:*



**Útvarpið**
Ein tann frægasta sendingin í ÚF í løtuni er frásøgnin hjá Árna Joensen »Turkaránið í Vestmannaoyggjum«. Eg skal siga fyri meg, at eg sjáldan seti meg at lurta eftir útvarpinum eitt gerandiskvøld. Tað er, sum um at tíðin er farin frá hesum her við upplestri. Tøknin hevur ført okkum so langt fram, at vit tíma ikki longur bert at lurta eftir einari rødd í eini heilari sending. Men tíbetur verður hildið fram við hesum í útvarpinum, tí her er veruliga nakað, sum er spennandi at lurta eftir. Tú skalt bert leggja teg afturá og lurta, bara lurta. Nær gjørdi tú tað seinast?

»Spyr bara« er eitt heilt annað slag av sending, og mær dámar hana sera væl. Men eg eri samstundis glaður fyri, at hon ikki er oftari, enn hon er. Innihaldið er ein hóskilig blanding av vitan, hugna og skemti. Tó hevði sendingin verðið meira lurtaravinarlig, um eitt lag varð spælt millum spurningarnar, soleiðis at vit lurtarar fingu stundir at tjakast víðari um evnið eina lítla løtu heima í stovuni. So hevði verið møguligt hjá okkum at tagt, meðan serfrøðingarnir tosaðu. Annars meini eg, at tað eru alt ov nógvar spurnarkappingar í undirhaldssendingunum í ÚF. Gott í tykkum, finnið upp á okkurt annað.

**Sjónvarpið**
Í sjónvarpsskránni var ikki nógv nýtt føroyskt at síggja. Tað eru teir gomlu kenningarnir: Dagur og vika, Basalt, Okkara kokkar og so barnasendingarnar. Flestu av hesum sendingum koyra meira ella minni í tómgongd í løtuni. Her er sjáldan nakað nýtt. Okkara kokkar vóru góðir og hugnaligir í byrjanini, men nú sær út til, at teirra fremsta uppgáva er at vísa fram vørurnar hjá stuðlunum. Liðugt gjørdar sósir o.s.fr. Gastronomi? Nei. HB kokkast móti B36? Nei, men lundar yvir rossalorti? Jú, tað ljóðar betur.

Basalt hevur altíð áhugaverd evni. Seinast vóru Kingo, Tóroddor Poulsen og James Olsen á skránni. Hesin síðsti hevði ætlanir um at koma sær upp í altjóða poppkórið og at fáa sær grannskoðara. Eg undri meg bert yvir, at SvF ikki fær meira íblástur frá listafólkunum, sum tey tosa við, til at gera eina sending, ið á ymsan hátt brýtur meira upp úr nýggjum. Síðsta sending var av basalti. Gevið sendingini betri flog. Breddin týskvøldið um olju og mentan var besta føroyska innslagið í SvF hesa vikuna.

**Bestubitar: Søga og spír 2:6**




**Leygarkvøld**




**Expedition 2000**
*– kaving niður á jólaskipið*




**Fatal Beauty**

